Rættarmálið móti Helenu byrjað:

# Ørkymlandi framløga



Rættarmálið móti Helenu Dam á Neystabø um uppsøgnina av fyrrverandi sjúkrahúsleiðaranum, Jákup Mørkøre, byrjaði fyrrapartin í gjár

Mynd: Jens K. Vang

**Meginparturin av tíðini fór til at umseta ein hóp av føroyskum skjølum til danskt fyri danska dómaranum, tá rættarmálið millum Jákup Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahúsleiðara, og Helenu Dam á Neystabø, landsstýrismann, byrjaði í gjár**

RÆTTARMÁL
*John Johannessen*

Viðgerðin av rættarmálinum millum Jákup Mørkøre, fyrr verandi sjúkrahúsleiðara, og landsstýrismannin í almanna- og heislumálum fyrrapartin í gjár sýndi greitt, at ivi kann sást um rættartrygdina við eini danskari rættarskipan í Føroyum.

Tað er Jákup Mørkøre, sum hevur stevnt Helenu Dam á Neystabø fyri ærumeiðing í sambandi við, at hon 4. februar í fjør segði honum upp sum sjúkrahúsleiðara við teirri grundgeving, at hann hevði verið ólýðin og illoyalur móti politisku skipanini, tá hann frammanundan alment boðaði frá í miðlunum, at ætlaðar sparingar á Landssjúkrahúsinum fóru at hava við sær hópuppsagnir.

## Umseta skjøl

Av tí at málið snýr seg um umsitingarligar og fyrisitingarligar ósemjur, eru próvførslurnar hjá báðum pørtum ein hópur av skrivligum samskifti millum sjúkrahúsleiðaran, landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum og aðrar myndugleikar á almanna- og heilsuøkinum.

Hesi skjøl eru øll skrivað á føroyskum, og av tí, at dómarin er danskur og skjølini ikki vóru umsett frammanundan, brúktu advokatarnir hjá báðum pørtum allan fyrraparin í gjár til at umseta skjølini leysliga fyri dómaranum so hvørt, teir nýttu tey sum próvførslur.

Tað var heilt týðuligt, at dómarin ikki skilti føroyska tekstin, sum hann hevði framman fyri sær, og tað kom fleiri ferðir fyri, at advokatarnir umsettu skeivt. Tí mátti fleiri ferðir takast aftur í aftur fleiri brot út ymsum skjølum, og hóast talan ofta var um smálutir, fekst tú ofta eina kenslu av, at dómarin ikki altíð var heilt við.

## Drúgv viðgerð

Talan er um eitt heldur torskilt mál, og tí hevði Føroya Rættur fyribils sett allan dagin í gjár av til viðgerðina.

Tá Sosialurin beint eftir døgurða fór til prentingar, vóru advokatarnir júst lidnir at leggja próvførslur sínar fram. Eftir døgurðasteðgin skuldu vitni avhoyrast.

Jákup Mørkøre krevur í fyrstu atløgu, at Helena Dam á Neystabø verður dømd fyri ærumeiðing við bót ella hefti. Í aðru atløgu krevur hann, at Helena Dam á Neystabø verður dømd at viðurkenna, at Jákup Mørkøre ikki hevur ólýðin og illoyalur.


Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin

Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin

ROYN HENDAN
SERA VÆLUMTØKTA BILIN

KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar

Familju - camping - firmabilur- og "mini-bussur"

Fæst eisini sum vøruvognur

EINANS 197.800,-





Multibilurin
til einhvørja loysn

Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.

3 ára garanti/100.000 km. garanti

EINANS 236.800,-



Rætti bilurin til mong endamál.
–Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.

Sosialurin - 311820

D. B. Bilar
J. Bronckgøta 15 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 310600


# Køkurin fór illa



ELDUR
*Eyðun Klakstein*

Fríggjamorgunin um 10-tíðina var sløkkiliðið í Havn boðsent til eini sethús við Velbastaðvegin í Havn.

Eldur var komin í eina grýtu, og hóast konan, sum var inni, roydni at sløkkja eldin, eydnaðist tað ikki heilt.

Eldurin breiddi seg í køkinum og millum skins og holds, og køkurin fekk stóran skaða. Sløkkiliðsmenninir brutu plátur frá í køkinum fyri at tryggja sær at eldurin millum skins og holds varð sløktur.







*Bjørn Harlou, Ásmund Gudjónsson og Maria Róin vóru í Klaksvík mikudagin og kunnaðu vinnuna um nýggju djórasjúkulógina.*

Mynd:SJH

# Norðoyggjar fyrireika seg til nýggj krøv

**Mikudagin var fundur um nýggju djórasjúkulógina í Klaksvík. Fólk frá Vinnumálastýrinum kunnaðu fiski- og alivinnuna um krøv og staðfestingar í nýggju lógini**

VINNA
*Eyðun Klakstein*

Umboð fyri fiskavirkini og alivinnuna vóru mikudagin á fundi í kantinuni á Kósavirkinum í Klaksvík, har fólk frá Vinnumálastýrinum greiddu frá um nýggju djórasjúkulógina, sum nú er fyri í tinginum.

Lógin er eitt úrslit av nýggjari avtalu við ES, sum ger at føroyskar fiskavørur fáa lættari atgongd til ES-marknaðin. Samstundis fer lógin eisini at broyta ymisk viðurskifti í Føroyum.

– Enn er Klaksvík ikki so nógv við í oljuvinnuni, og í løtuni verður satsað nógv upp á fiskivinnuna. Tí er tað umráðandi at vinnan kennir nýggju lógina og tey krøv, sum eru í henni, sigur Jógvan við Keldu, tingmaður, sum tók stig til fundin í Klaksvík mikudagin.

## Mugu verða frammaliga

Bjørn Harlou, landsdjóralækni, Ásmund Gudjónsson, leiðari á fiskivinnudeildini á Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, og Maria Róin, deildarstjóri í Vinnumálastýrinum, vóru á fundinum. Hesi hava samráðst við ES vegna Føroya landsstýri.

Tey bæði løgdu fram og tosaðu við umboðini fyri fiski- og alivinnuna í Norðoyggjum. Umboð fyri Klaksvíkar býráð vóru eisini boðin við til fundin, tí nýggja lógini fer millum annað at seta nýggj krøv til havnaviðurskifti.

– Tað er umráðandi, at eitt so sterkt fiskivinnuøki sum Klaksvík, sum hevur ein útflutning fyri um 800 milliónir, er frammaliga, tá talan er um góðkenningar hjá ES. Tí tók eg stig til fundin, sigur Jógvan við Keldu.

– Fiskivinnan í Klaksvík er fjølbroytt og professionell, og hon skal verða klár til nýggju lógina, har ES skal góðkenna virki og havnaøki, sigur hann.

Jógvan við Keldu heldur, at fiskivinnuskeiðið, sum verður hildið í gamla Tekniska skúla í Klaksvík, er ein góður táttur í at menna støðið innan vinnuna enn meiri.

## Eftirlitsstøð í Klaksvík

Ein partur av nýggju lóggávuni umfatar eisini eina nýggja eftirlitsstøð fyri triðjalandsfisk, sum skal gerast í Føroyum.

Jógvan við Keldu mælir nú til, at eisini klaksvíkingar kanna, um teir hava bygning, sum kann brúkast og góðkennast til hetta virksemi fyri at fáa eina betri tænastu, hóast ein onnur støð verður bygd Føroyum.

– Tað er umráðandi, at Norðoyggjar hava góða tænastu, tá tað ræður um fiskivinnu, og tí haldi eg, at tað skuldi verið kanna, um ein bygningur í Klaksvík kundi verið brúktur til eftirlitsstøð, sigur Jógvan við Keldu.

Fólkini, sum vóru á fundinum mikudagin, fáa nú eitt referat av fundinum, og tey fáa eisini tey pappír, sum fólkini frá Vinnumálastýrinum brúktu í sínum framløgum.

# Landslæknin avvísti granskingarmálið

**Landslæknin vildi einki hava við málið um granskingina hjá Ulrike Steuerwald at gera. Tí endaði málið hjá løgregluni**

GRANSKING
*Eyðun Klakstein*

Vísindasiðsemisnevndin roydni í tveimum førðum at fáa landslæknan at taka sær av málinum um gengranskingina hjá Ulrike Steuerwald, men hann vildi einki hava við málið at gera.

Vísindasiðsemisnevndin kendi seg tí noydda at lata løgregluni málið, hóast hetta ikki var ætlanin í fyrstu syftu.

Hetta kemur fram í frágreiðing, sum formaðurin í Vísindasiðsemisnevndini sendi Almanna- og Heilsumálastýrinum, og sum Sosialurin hevur fingið innlit í.

Høgni Djurhuus, formaður í Vísindasiðsemisnevndini, greiðir í skrivinum frá, at nevndin steðgaði kanningunum hjá Ulrike Steuerwald, tí nevndin helt ikki, at hon hevði neyðugu loyvini.

Ulrike Steuerwald greiddi í blaðnum í gjár frá, at hon helt alt verða í lagi, tá hon fór undir granskingina.

– Nevndin ivaðist í, hvør var rætti myndugleikin til at taka sær av málinum – fútin ella landslæknin – og kom til ta niðurstøðu, at landslæknin skuldi hava málið, greiður Høgni Djurhuus frá í skrivinum.

– Ví vendu vit okkum til landslæknan í tveimum førum, so hann kundi taka sær av málinum. Hann avvísti málið í báðum umførum, og tí sendu vit málið til fútan.

Mikudagin noktaði Høgni Debes Joensen, landslæknin, fyri at gera viðmerkingar til málið, og í gjár eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á honum.


-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,0 Gli
Skrás.: 02-04-98
Km.: 44.000
Prísur: 189.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 17-01-96
Km.: 81.000
Prísur: 79.000,- Garanti *

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 165.600,- Garanti*

SSANGYONFG MUSSO 4X4
Skrás.: 18-12-97
Km.: 43.000
Prísur: 187.600,- Garanti*

TOYOTA CAMRY 2,0 Gli
Skrás.: 10-07-91
Km.: 129.000
Prísur: 69.600,-
Sýnaður 10-00

VOLVO 460 SEDAN
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-
Sýnaður 06-99

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SEDAN
Skrás.: 24-08-95
Km.: 112.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

VW POLO 1,9 TDI STATION
Skrás.: 14-04-00
Km.: 11.000
Prísur: 149.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 CDX
Skrás.: 18-10-96
Km.: 77.000
Prísur: 103.600,- Garanti*

PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL
Skrás.: 10-01-96
Km.: 80.000
Prísur: 128.600,- Garanti*
Sýnaður 09-00

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN
Skrás.: 30-05-94
Km.: 109.000
Prísur: 89.600,- Garanti*
Sýnaður 03-00

OPEL ASTRA 1,7 TURBO DIESEL
Skrás.: 31-07-96
Km.: 105.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 GL
Skrás.: 07-10-88
Km.: 208.000
Prísur: 42.600,-
Sýnaður 05-00

OPEL ASTRA 1,6 I STW.
Skrás.: 03-11-97
Km.: 35.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 21-01-98
Km.: 47.000
Prísur: 127.600,- Garanti *

HYUANDAI ACCENT 1,5
Skrás.: 02-01-98
Km.: 25.000
Prísur: 79.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 30-08-95
Km.: 151.000
Prísur: 100.600,- Garanti*
Sýnaður 01-00

FORD MONDEO TURBO DIESEL
Skrás.: 01-09-99
Km.: 44.000
Prísur: 142.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B
Skrás.: 11-08-98
Km.:17.000
Prísur: 132.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,6
Skrás.: 22-09-95
Km.: 87.000
Prísur: 74.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B
Skrás.: 30-09-98
Km.: 52.000
Prísur: 115.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,6 5 HURÐAR
Skrás.: 06-06-95
Km.: 82.000
Prísur: 65.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 05-03-99
Km.: 34.000
Prísur: 117.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,8 SPORT
Skrás.: 01-08-95
Km.: 43.000
Prísur: 74.600,-
Sýnaður 12-00

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6
Skrás.: 19-11-98
Km.: 15.000
Prísur: 124.600,-Garanti**

CITROEN BX DIESEL
Skrás.: 01-11-88
Km.:
Prísur: 29.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur: 114.600,- Garanti**

SUZUKI ALTO 1,0
Skrás.: 13-11-96
Km.: 43.000
Prísur: 60.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B
Skrás.: 16-10-97
Km.: 57.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

Støkkið inn á gólvið!

VØRUVOGNAR

MERCEDES BENZ VITO VAN
Skrás.: 23-06-98
Km.: 50.000
Prísur: 148.600,- Garanti*

NISSAN KING VAN
Skrás.: 29-09-95
Km.: 85.000
Prísur: 80.600,- Garanti*

MAZDA B-2500 PICK-UP DIESEL
Skrás.: 11-05-00
Km.: 9.000
Prísur: 128.600,- Garanti*

Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN.
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

Sosialurin - 311820

REYNI SERVICE



Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040